# Klaksvíkingar bæði gull og bronsu

**Klaksvíkar Billardfelag vann bæði gull og bronsu í føroyameistarakappingini í billard fyri lið. Í endaspurtinum um vikuskiftið vístu royndu og frægu billardspælararnir úr Klaksvík, at føroyskt billard er tað sama sum Klaksvík og klaksvíkingar**

Eftir eina sera javna og spennandi kapping eydnaðist tað oddaliðnum hjá Klaksvíkar Billardfelag at vinna gull. Havnar Klubbi, sum fekk silvur, gavst tó ikki, fyrr enn seinasta umfar var liðugt. Tá avtornaði, var javnt millum KBF og HK, tí bæði liðini fingu 40 stig, men klaksvíkingar vóru teir nógv betru, tá tað kom til eygu. At Klaksvíkin eigur Føroya bestu billardspælarar prógvaði eisini teirra næstbesta lið, KBF2, sum tók bronsuna við heim.

Kappingin í ár hevur verið sera jøvn, og meðan KBF1 legði seg á odda frá byrjan, so kom HK sterkt aftur og yvirhálaði klaksvíkingar undan seinasta umfarinum. Men Hallur Joensen og Sonhard Johannesen vóru teir stinnaru, tá ástóð. Á silvurliðnum hjá Havnar Klubba vórðu Niels Nielsen og Jógvan Jørgensen.

Mimir, sum vitjaði í Klaksvík um vikuskiftið, fekk ikki fótin fyri seg. Steinbjørn í Dali og Jan Müller, sum hava mannað Mimirsliðið í mong ár, máttu fara heimaftur við ongum stigi. KBF1 vann 8-0 á Mimi, sum við hesum úrslitinum noyðist at sleikja sárini til næsta kappingarár.

### Eisini klaksvíkingar

Úrslitið av FM-kappingini varð annars sera javnt. Javnleikur var í stigum, bæði um gullið og um bronsuna, so eyguni avgjørdu, hvør gjørdist vinnari. Aftasta liðið í kappingini var Tvøroyrar Billardfelag.

Taka vit einstøku úrslitini, gjørdist Kristian Sune Høgnesen besti spælarin í liðkappingini við nærum 30 eygum í meðal. Næstbestur var Hallur Joensen við umleið 24 eygum í meðal, og á triðja plássi var enn ein klaksvíkingur, Sonhard Johannesen, við umleið 23 eygum. Í hølunum á teimum kom Steinbjørn í Dali.

FM í billard fyri einstaklingar verður spælt í Havnar Klubba á páskum. Tá fara 12 av landsins bestu billardspælarum at dystast um, hvør skal vinna FM-heitið fyri 2010. Verandi meistari er Kristian Sune Høgnesen úr Klaksvíkar Billardfelag, sum óivað verður ringur at taka, men í billard er einki avgjørt fyrr enn í seinasta umfarinum.

## FAKTA

### Atlantic Airways-kappingin

**Neistin-StÍF 24-31 (13-13)**
**10 min:** 2-6
**20 min:** 7-10
**40 min:** 14-19
**50 min:** 22-26
**Málskjúttar**
**Neistin:** David Edvardsen 5 (2), Jugoslav Djumic 4, Finnur Hansson 3, Heini Hanusarson 3, Tróndur Kragesteen 3, Sjúrður Thomasen 3, Heini Ragnarsson 2, Ingi Olsen 1
**StÍF:** Leivur Justinussen 9 (1), Cristian Preda 9, Jóannes Prestá 5, Marius Joensen 4, Bárður Danielsen 2, Borgar Danielsen 1, Pauli G. Hansen 1
**Brotskøst:** Neistin 2, StÍF 1
**Útvísingar:** Neistin 4, StÍF 4
**Dómarar:** Hans Thomasen & Hanus Kúrberg

**VÍF-KÍF 24-26 (13-11)**
**10 min:** 3-3
**20 min:** 11-9
**40 min:** 15-14
**50 min:** 21-21
**Málskjúttar**
**VÍF:** Karl J. Djurhuus 6, Sámal Joensen 6 (4), Bjarti Hansen 4, Áki G. Olsen 4, Áki Olsen 2, Agnar Joensen 1, Sjúrður Poulsen 1
**KÍF:** Gert Hansen 8, Niklas Reginsson 6, Andrias Nielsen 3 (3), Ási Dam 2 (1), Teitur Joensen 2, Regin Petersen 2, Rógvi Weyhe 2, Jákup Trygvason 1
**Brotskøst:** VÍF 5, KÍF 5
**Útvísingar:** VÍF 4, KÍF 4
**Dómarar:** Andreas F. Hansen & Eyðun Samuelsen

**H71-Kyndil 23-24 (10-14)**
**10 min:** 3-4
**20 min:** 7-10
**40 min:** 14-16
**50 min:** 18-21
**Málskjúttar**
**H71:** Dánjal Tórgarð 10 (7), Poul Kjartan Dam 3, Esbern Patursson 3, Janus Sørensen 3, Rógvi Sørensen 2, Rúni V. Højgaard 1, Karolis Daynis 1
**Kyndil:** Bárður Johannesen 8, Janus Einar Sørensen 4, Høgni Klein 3, Kenn Zachariassen 3, Hans Áki Dal-Christiansen 2 (1), Tummas Pauli Hanusarson 2 (1), Josef Abrahamsen 2
**Brotskøst:** H71 7, Kyndil 2
**Útvísingar:** H71 3, Kyndil 5
**Dómarar:** Ragnar Simonsen & Rúni Mohr

## FAKTA

### Sunset-kappingin

**VB-Stjørnan 25-39**
(eingin dómaraseðil móttikin)

**VÍF-Tjaldur 25-21 (11-10)**
**10 min:** 5-3
**20 min:** 8-6
**40 min:** 16-14
**50 min:** 23-18
**Málskjúttar**
**VÍF:** Liljan Djurhuus 8 (3), Heidi Joensen 5, Agnas Olsen 4, Finngerð Joensen 4, Halla Midjord 3, Elisa Leo 1
**Tjaldur:** Adina Petrea 11 (5), Annika Thomsen 3, Mary-Ann Zachariassen 3, Benedikta Johannesen 1, Hann I. Højgaard 1, Alina O. Anghel 1, Jóhanna Hansen 1
**Brotskøst:** VÍF 3, Tjaldur 6
**Útvísingar:** VÍF 2, Tjaldur 6
**Dómarar:** Andreas F. Hansen & Eyðun Samuelsen

**Neistin-StÍF 28-23 (13-12)**
**10 min:** 5-2
**20 min:** 10-9
**40 min:** 19-13
**50 min:** 24-16
**Málskjúttar**
**Neistin:** Unn Kragesteen 6, Anja Heinadóttir 5, Louisa Andreasen 4, Lina Andriulyte 3, Birita Wardum 3, Rakul Augustinussen 2, Unn Danielsen 1, Katrin á Neystabø 1, Marjun F. Danberg 1
**StÍF:** Roxana Bodirlau 6, Rebekka Justinussen 4, Fríðrun Danielsen 3, Adriana Dobra 3 (2), Birna Johannesen 3, Sunfríð Johansen 2, Anna Petersen 1
**Brotskøst:** StÍF 2
**Útvísingar:** Neistin 2, StÍF 2
**Dómarar:** Hans Thomassen & Hanus Kúrberg

www.sosialurin.fo

### Máltindarnir, hondbóltur

| Sunset-kappingin | | Mál (br.) |
|---|---|---|
| Adina Petrea | Tjaldur | 195 (21) |
| Liljan Djurhuus | VÍF | 141 (46) |
| Simona Petersen | Stjørnan | 124 (20) |
| Cornelia Rimbu | Tjaldur | 116 (23) |
| Rebekka Justinussen | StÍF | 114 (22) |
| Valentina Suciu | Stjørnan | 113 (19) |
| Roxanna Bodirlau | StÍF | 96 (5) |
| Katrin á Neystabø | Neistin | 84 (23) |
| Anja Heinadóttir | Neistin | 79 |
| Heidi Joensen | VÍF | 73 (7) |
| Migle Senvaityte | VB | 68 (32) |
| Adriana Bobra | StÍF | 66 (36) |
| Fríðrún B. Danielsen | StÍF | 65 |
| Annika Thomsen | Tjaldur | 64 |
| Lina Andriulyte | Neistin | 61 (3) |

| Atlantic Airways-kappingin | | Mál (br.) |
|---|---|---|
| David Edvardsen | Neistin | 152 (32) |
| Sámal Joensen | VÍF | 128 (41) |
| Cristian Preda | StÍF | 112 (6) |
| Dánjal Tórgarð | H71 | 112 (45) |
| Poul Kjartan Dam | H71 | 110 (15) |
| Bjarti Hansen | VÍF | 102 |
| Finnur Hansson | Neistin | 92 (11) |
| Jugoslav Djumic | Neistin | 91 (1) |
| Janus Sørensen | H71 | 78 |
| Høgni Klein | Kyndil | 78 |
| Niklas Reginsson | KÍF | 78 (7) |
| Bárður Johannesen | Kyndil | 77 (1) |
| Gabriel Stanciu | StÍF | 74 (28) |
| Agnar Joensen | VÍF | 73 (7) |
| Josef Abrahamsen | Kyndil | 72 (21) |




### Hondbóltur

**Sunset-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 20 | 18 | - | 1 | - | 1 | 590 | 414 | 176 | 37 |
| 2 Tjaldur | 20 | 15 | - | 1 | - | 4 | 566 | 441 | 125 | 31 |
| 3 Neistin | 20 | 12 | - | 0 | - | 8 | 524 | 476 | 48 | 24 |
| 4 VÍF | 20 | 7 | - | 0 | - | 13 | 485 | 552 | -67 | 14 |
| 5 StÍF | 20 | 5 | - | 0 | - | 15 | 470 | 591 | -121 | 10 |
| 6 VB | 20 | 2 | - | 0 | - | 18 | 439 | 600 | -161 | 4 |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Neistin | 19 | 15 | - | 0 | - | 4 | 614 | 516 | 98 | 30 |
| 2 VÍF | 19 | 9 | - | 0 | - | 10 | 553 | 540 | 13 | 18 |
| 3 StÍF | 19 | 8 | - | 1 | - | 10 | 495 | 509 | -14 | 17 |
| 4 KÍF | 19 | 8 | - | 1 | - | 10 | 491 | 522 | -31 | 17 |
| 5 Kyndil | 19 | 8 | - | 1 | - | 10 | 463 | 519 | -56 | 17 |
| 6 H71 | 19 | 6 | - | 3 | - | 10 | 503 | 513 | -10 | 15 |